# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*- Eitt stórt land í Vesturheiminum sigur seg vilja hjálpa okkum, men tann góði viljin er ikki veruligur*

*Stýrið í Burma*

# Bíðaðu fýra dagar eftir hjálp

**Í fýra samdøgur sótu níggju fólk í fjøllunum í Kili og bíðaðu eftir hjálp, eftir at flogfar teirra var dottið niður**



*Miguel Almoncaid ivaðist ikki í, at hann og hini ferðafólkini fóru at doyggja*

*Mynd: AP*

- Tað var stormur og ræðuliga kalt, og vit royndu at halda hitanum við at sita undir liðini á hvør øðrum. Men eg ivaðist ikki í, at vit fóru at doyggja.

Tað sigur Miguel Almonacid, sum var ein av teimum níggju, sum sluppu livandi frá einari flogvanlukku í Kili seinasta leygardag. Eitt fólk doyði, tá flogfarið datt niður í eitt oyðið skógarøki har suðuri í landinum.

Vanlukkan minnir um ta kendu vanlukkuna í 1972, tá eitt flogfar datt niður í Andesfjøllunum, og tey, sum sluppu livandi frá sjálvum fallinum, nyddust at eta burtur av hinum ferðafólkunum fyri at halda sær á lívi.

Tað lítla Cessna-flogfarið, sum datt niður leygardagin, rendi á nøkur stór trø, har tað varð hangandi. Kortini eydnaðist tað fólkunum at sleppa út, men tað var bítandi kalt, og um náttina frysti fýra stig.

- Vit ballaðu okkum við øllum, sum vit høvdu, og vit kyndu bál fyri at fáa hita í okkum, sigur Miguel Almoncaid við útvarpið Radio Coopoerativa.

### Flogskiparin doyði

Øll tey 10, sum vóru í flogfarinum, sluppu livandi frá sjálvum fallinum, men tann 65 ára gamli flogskiparin, Nelson Bahamondes, doyði tveir dagar seinni av løstum, sum hann hevði fingið.

Tá flogfarið ikki kom vegin fram leygardagin, fóru kilsku myndugleikarnir alt fyri eitt at leita. Miguel Almoncaid sigur, at teyr hoyrdu fleiri ferðir flogfør og tyrlur, men ikki fyrr enn mikudagin var tað so mikið klárt í veðrinum, at tey fingu givið einari tyrlu tekin um, hvar tey vóru stødd.



*Nú er næstan einki grønmeti at fáa í teimum sponsku handlunum*

*Mynd: Polfoto*

# Eldur í Kalifornia

**Enn eina ferð hava skógareldar sett Kalifornia í undantaksstøðu**

Kalifornia brennur aftur, og enn eina ferð hevur Arnold Schwarzenegger, guvernørur, verið noyddur at lýs astatin í undanatskstøðu.

Orsøkin er, at fleiri skógareldar herja í statinum. Har suðuri eru 6.500 hektarar farnir upp í royk, og har norðuri er ein stórur skógareldur á veg ímóti býnum Paradise, har 30.000 fólk búgva.

Tað hevur ikki regnað í Kalifornia leingi. Harafturat er tað heitt, og umstøðurnar hjá sløkkiliðunum kundu tí valla verið truplari, enn tær eru, skrivar AP.

# Mattrot í Spania

**Verkfallið hjá teimum sponsku lastbilstjórunum ger, at fleiri matvørur eru farnar at ganga undan**

Teir sponsku lastbilstjórarnir sýta fyri at seta seg aftur við róðrið, fyrr enn stjórnin tekur onkur stig til tess at tryggja teimum bíligari olju.

Lastbilstjórarnir hava nú verið í verkfalli í fleiri dagar, og tað sæst í handlunum kring alt landið. Sky News sigur, at í nógvum stórhandlum er tað torført at fáa feskan fisk og feskt kjøt, og harumframt eru frukt og grøtmeti farin at ganga undan.

Ein orsøk til støðuna er, at mong hava lagt so nógv inn undir seg, at ov lítið ella einki er eftir til hini, sigur Sky News.



*Fleiri hús eru farin upp í royk í skógareldunum*

*Mynd: Polfoto*